# Merkisdagar

### Diamantbrúdleyp
Fríggjadagin 20. mai 2011 kunnu hjúnini Esther og Eivind Petersen, Oyndarfjørður hátíðarhalda 60 ára brúdleypsdag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17. Tey, ið vilja gleða okkum við at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 444529 ella 444501 innan 13. mai.

### Silvurbrúdleyp
Fríggjadagin 10. juni halda vit bæði. Sonlis og Tummas Eli Høj Joensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skalabotni frá kl 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 3. juni á tlf. 749451 ella á telduposti: tehj@kallnet

### Brúdleyp
Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15. mai 2011.

### Brúdleyp
Leygardagin 21. mei kl. 15 giftast Katrin Hensiudóttir og Sjúrður Jacobæus í Gamle Vor Frue Kirke í Roskilde. Brúðarveitslan verður hildin á Byleddet 3D, Roskilde fyri innbodnum.

### Brúdleyp
Leygardagin 2. juli giftast Rannvá Arge Funn úr Vestmanna og Dagfinnur Jensen úr Skopun. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 14. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 18.30. Tey sum vilja gleða okkum, við at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 20. juni á tlf. 361600.

### 60 ára føðingardagur
16. mai fyllir Jórun Thomsen, Sumba, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 21. mai frá kl. 15.

### Ferming
Sofie Nissen, dóttir Jóndis J. Henriksen av Sandi, verður fermd í Glumsø kirkju dýra biðidag.

### Konfirmantar í Kollafjarðar kirkju dýra biðidag 20. mai kl. 11.00
Deepa Eyð Patel, á Todnesi 17, 410 Kollafjørður
Halla Askersdóttir Hansen, Ósabakkavegur 10, 410 Kollafjørður
Kára Djurhuus, í Líðini 93, 410 Kollafjørður
Maria Olsen, Steinsgøta 6, 410 Kollafjørður
Rannvá Midjord, á Lygnnesi 14, 410 Kollafjørður
Sára Nólsoy Arabo, á Oyrareingjum 110, 415 Oyrareingir
Signhild Djurhuus, við Sjógv 13, 410 Kollafjørður
Adrian Vanzon Joensen, Steinsgøta 8, 410 Kollafjørður
Edvard Joensen, á Signabø 62, 416 Signabøur
Fríði Jacobsen. Dagurin verður hildin hjá Chr. Martin og Ellfríð Dam, Heygavegur 10, 410 Kollafjørður
Hjalti Hammer Matras, í Líðini 49, 410 Kollafjørður
Ragnar Gaard, Bøgøta 7, 410 Kollafjørður
Rani Joensen, á Signabø 4, 416 Signabøur
Sveinur í Køk, Gerðisvegur 6, 416 Signabøur
Vilhelm Magnussen, á Todnesi 36, 410 Kollafjørður

### Konfirmantar í Kvívíkar kirkju 4. sunnudag eftir páskir 22. mai kl. 12.00
Elisa Maria Joensen, Frammi í Gerði 15, 340 Kvívík
Heidi Lindenskov Róadóttir, Víkarvegur 66, 340 Kvívík
Laila Djurhuus, Garðavegur 5, 335 Leynar
Djóni Debes Isaksen, Víkarvegur 33, 340 Kvívík
Eyðun Petersen, Leynarvegur 59, Leynar
Rói Hansen, Frammi í Gerði 8, 340 Kvívík
Steffan Jensen, Frammi í Gerði 12, 340 Kvívík

### Konfirmantar í Tvøroyrar kirkju Dýra biðidag, 20. apríl
Malene Askham Petersen, Tvøroyri.
Kristina Dyrhus Poulsen, Tvøroyri.
Marcus Páll Ackley, Tvøroyri.
Ári Heinesen, Tvøroyri.
Andrias Strøm Rødgaard, Tvøroyri.
Petrina í Lágabø, Trungisvágur.
Anna Mikkjalsdóttir, Trungisvágur.
Jákup Eli Mortensen, Trongisvágur. Opið hús verður á Hotel Tvøroyri eftir kl. 18.
Petur Erhardsson Müller, Trongisvágur. Opið hús verður í Fornarætt 15 eftir kl. 18.
Rógvi Kárason, Trongisvágur. Opið hús verður á Trongisvágsvegi 92 eftir kl. 18.
Sólja Jensen, Froðba.
Magnus Egilsson Lisberg, Fámjin


## TAKS sóknast eftir einum roknskaparleiðara

### Vilt tú vera við til at tryggja, at landskassaroknskapurin er rættur?

**Høvuðsuppgávan** hjá roknskaparleiðaranum er at tryggja, at roknskapurin er rættur fyri stovnsnummur, ið TAKS umsitur.

**Uppgávurnar hjá** roknskaparleiðaranum eru eisini:
· At betra og effektivisera arbeiðsgongdir á stovninum
· At leiða og luttaka í ymsum verkætlanum
· At gera fíggjarlig hagtøl og metingar
· At hava eftirlit við fíggjarætlan
· At hava ábyrgdina av innaneftirlitinum hjá TAKS.

**Roknskaparleiðarin** hevur tvær smærri bókhaldsdeildir undir sær og vísir beinleiðis til stjóran.
Umsøkjarar til starvið skulu hava eina viðkomandi roknskaparliga útbúgving á merkonomstøði ella hægri.

**Royndir** innan almenna fyrisiting og alment roknskaparhald eru ein fyrimunur. Somuleiðis eru royndir í umsiting av skatta- og avgjalds-inntøkum ein fyrimunur, eins og kunnleiki til búskaparskipan landsins.

**Starvið krevur** eisini ávísan kunnleika til føroysk samfelags- og fíggjarviðurskifti.

**Tann, ið søkir, skal:**
· Vera framfýsin
· Megna eftirlitsarbeiði
· Hava góð evnir at samstarva
· Hava góða heildarfatan, men eisini góðan sans fyri smálutum
· Duga væl at skipa arbeiði og taka avgerðir
· Vera sera ábyrgdarfull/ur

**Starvið verður lønt** ájavnt við 35. lønarflokk í sáttmálanum ml. Tænastumannafelagið og FMR, umframt 15% í eftirløn, uttan tó at vera eitt tænastumannastarv.
**Setanarøkið** er TAKS, men fevnir eisini um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Eyðun Mørkøre, stjóra, á telefon 352600.

**Send umsóknina**, merkt Roknskaparleiðari, innan 1. juni 2011 kl. 12.00, til:

**TAKS, Postsmoga 2151,**
**FO-110 Tórshavn**
ella taks@taks.fo

Sosialurin 34 18 00



TAKS er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalsskattalógina og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. TAKS hevur 135 starvsfólk og er skipað við einum høvuðssæti á Argjum og trimum skrivstovueindum.

www.taks.fo